Stór framgongd í Su›uroynni tey seinastu fimm árini

Kreppan fyrst í nítiárunum rakti eisini Su›uroynna sera meint. Men sí›ani hevur framgongdin aftur veri› stór og nú er Su›uroyggin komin langt upp um stø›i›, hon var á, tá i› virksemi› var mest, seinast í áttatiárunum

ÁKI BERTHOLDSEN

Tá i› kreppan seig yvir landi› fyrst í nítiárinum, rakti hon eisini Su›uroynna sera meint.

Men sí›ani tá er vent í holini og hesi seinastu árini hevur framgongdin hjá vinnulívinum veri› rættiliga stór.

Og nú er vinnulívi› í Su›uroynni komin langt upp um ta› stø›i›, sum ta› var á, tá i› virksemi› annars var í hæddini í áttatiárunum, á›renn kreppuna.

Hetta vísa tey n‡ggjastu hagtølini yvir lønarútgjaldingarnar í teimum ymsu vinnugreinunum í Su›uroynni, samanbori› vi› tølini fyri restina av Føroyum.

Í sambandi vi› hagtøl yvir lønarútgjaldingar, er ta› at stórum t‡dningi at leggja dent á, at lønarútgjaldingarnar ver›a skrásettar í tí økinum, har arbei›sgevarin er skrásettur.

Sostatt eru at kalla allar almennar lønir skrásettar at hoyra til Havnina, hóast almenn arbei›spláss eisini eru úti um landi›.

Eitt nú ver›a allar lønarútgjaldingar til lærarar skrásettar at hoyra til Havnina, hóast nógvir lærarar eisini eru á bygd.

Ta› sama ger seg galdandi fyri Strandfer›sluna, Postverki›, Heilsuverki›, Føroya Tele, ein stóran part av banka og sparikassavirkseminum, o.s.fr.

Í Hagtølunum eru allar hesar lønirnar settar at hoyra til Havnina, hóast nógv av hesum fólkunum arbei›a á bygd.

Fyri at fáa eina rættvísa mynd av gongdini kring alt landi›, eru øll hesi tølini tí tikin burturúr hagtølunum.

Hagtølini á talvunum á hesi sí›uni fevna tískil bara um ta› vanliga vinnulívi›, sum ta› sæst á talvu tr‡, eitt nú fiskivinnu, bygging, ídna›, tænastuvinnu, fer›avinnu o.s.fr.

Og hesi tølini vísa, at afturmóti restini av Føroyum, hevur lutfalsliga framgongdin hesi seinastu árini næstan ongasta›ni veri› so stór, sum í Su›uronni.

Men til ta› er eisini at vi›merkja, at kreppan rakti eisini Su›uroynna sera meint.

Tølini á talvu tvey vísa, at í 1989, tá i› virksemi› var mest, vóru lønarútgjaldingarnar í Su›uroynni 187 milliónir.

Men í kreppuni fullu útgjaldingarnar heilt ni›ur á 120 milliónir í 1995, sum var ta› ringasta kreppuári›.

Ta› er ein afturgongd upp á 36%.

Men sí›ani tá eru tær komnar upp aftur á 215 milliónir. Ta› er ein framgongd sí›ani 1995 upp á ikki minni enn 79%.

Talvan vísir, at í prosentum er ta› bara Sundalagi›, sum hevur havt ein størri vøkstur.

Sundalagi› er nor›ari parturin í Streymoynni og nor›ari partur í Eysturoynni.

Talvan vísir eisini at Havnin slapp lættast burturúr kreppuni, tí har minka›u vinnuligu lønarútgjaldingarnar „bara" 16%, men nú eru tær so hækka›ar 24% aftur.

Talva 2. Lønargjaldingar í nøkrum høvuðsvinnum, 1989, 1995 og 1999
Allar vinnur uttan sjóflutning, post, tele, fígging og almennar tænastur

Tíðarskeið	Norð-oyggjar	Megin-eysturoy	Sunda-lagið	Suður-streym	Vágar	Sandoy	**Suðuroy**	Ótil-skilað	**Allar Føroyar**
árið 1989	320	435	181	934	139	59	**187**	116	**2371**
árið 1995	190	319	111	781	87	30	**120**	6	**1645**
árið 1999	289	570	202	968	128	52	**215**	2	**2426**
%-broyting 1989-1995	-41	-27	-39	-16	-37	-49	**-36**		**-31**
%-broyting 1995-1999	52	78	82	24	47	73	**79**		**47**
Fólkatal 1989	6.151	8.858	5.459	16.775	2.943	1.756	**5.845**		**47.787**
Fólkatal 1999	5.813	8.434	5.143	16.983	2.617	1.448	**4.971**		**45.409**
Broyting 1989-99, í tali	-338	-424	-316	208	-326	-308	**-874**		**-2378**
Broyting 1989-99, í %	-5	-5	-6	1	-11	-18	**-15**		**-5**
Løngj. (1000 kr.) pr.íbúgva 1999	**50**	**68**	**39**	**57**	**49**	**36**	**43**		**53**

Kelda: Hagstova Føroya

Hendan talvan vísir gongdina í lønarútgjaldingunum í teimum ymsu landspørtunum í Føroyum sí›ani 1989. Fyrstu tølini eru frá 1989, tá i› virksemi› var í hæddini. Onnur tølini eru fyri 1995, tá i› kreppan var djúpuast og tri›ju tølini eru fyri 1999. Talvan vísir eisini gongdina í fólkatalinum hesi árini Somulei›is vísir talvan mi›allønina fyri hvørt fólk í teimum ymsu landspørtunum. Les annars tekstin fyri at skilja talvuna betur

Útgreining av talvu 2: Lønargjaldingar í nøkrum høvuðsvinnum í 1999
Allar vinnur uttan sjóflutning, post, tele, fígging og almennar tænastur

Vinnugrein	Norður-oyar	Megin-eysturoy	Sunda-lagið	Suður-streymoy	Vága-økið	Sandoy	**Suðuroy**	Ótil-skilað	**Allar Føroyar**
1.Landbúnaður	0	1	0	3	0	1	**0**	0	**5**
2.Fiskiskapur	125	227	82	125	60	24	**103**	1	**748**
3.Ali- og kryvjivirki	21	16	25	26	7	0	**15**	0	**110**
5.Ráevnisvinna	0	7	0	4	0	0	**0**	0	**11**
6.Fiskavøruídnaður	52	107	40	41	15	19	**36**	0	**310**
7.Skipasmiðjur, smiðjur	10	34	5	36	1	0	**4**	0	**91**
8.Annar ídnaður	12	34	19	63	11	1	**8**	0	**147**
9.Bygging	16	34	10	130	3	1	**24**	1	**219**
11.Handil og umvæling	27	62	10	303	6	5	**17**	0	**430**
12.Gistihús og matstovuvirk	3	2	1	35	3	0	**2**	0	**46**
14.Flutningur annars	11	22	4	23	21	1	**3**	0	**84**
17.Vinnuligar tænastur	6	3	1	97	1	0	**1**	0	**109**
18.Húshaldstænastur	2	14	2	7	0	0	**1**	0	**26**
22.Felagsskapir, mentan	4	5	3	76	0	0	**2**	0	**91**
Tils. uttan flutn./post/tele/	**289**	**570**	**202**	**968**	**128**	**52**	**215**	**2**	**2426**

Kelda: Hagstova Føroya

Hendan talvan er ein útgreining av talvuni omanfyri, tí hon vísir, hvørjum vinnum, lønarútgjaldingarnar í teimum ymsu landspørtunum eru í. Talvan vísir, á hvørjum økjum, teir ymsu landspartarnir eru veikir og, hvar teir standa seg væl. Les annars tekstin fyri at skilja talvurnar betur.

Men í kreppuni fullu útgjaldingarnar heilt ni›ur á 120 milliónir í 1995, sum var ta› ringasta kreppuári›.

Ta› er ein afturgongd upp á 36%.

Men sí›ani tá eru tær komnar upp aftur á 215 milliónir. Ta› er ein framgongd sí›ani 1995 upp á ikki minni enn 79%.

Talvan vísir, at í prosentum er ta› bara Sundalagi›, sum hevur havt ein størri vøkstur.

Sundalagi› er nor›ari parturin í Streymoynni og nor›ari partur í Eysturoynni.

Talvan vísir eisini at Havnin slapp lættast burturúr kreppuni, tí har minka›u vinnuligu lønarútgjaldingarnar „bara" 16%, men nú eru tær so hækka›ar 24% aftur.

Lønin lág

Talvan vísir eisini, at mi›allønin hjá hvørjum fólki í Su›uroynni eru ímillum tær lægstu í landinum.

Hvør Su›uroyingur forvann ikki meiri enn 43.000 krónur í mi›al í fjør.

Hetta er nógv minni enn í Nor›oyggjum, sum vit ofta samanbera okkum vi›, tí har var mi›allønin 50.000 fyri hvørt fólki›.

Men talvan vísir eisini, at vinnuliga mi›allønin er hægst í Megineysturoy. Megineysturoy er sy›ri parturin í Eysturoynni, Skálafjør›ur o.s.fr.

Har var mi›alløn í fjør 68.000 fyri hvørt fólki›. Í Havnini er hon 57.000 krónur.

Annars vísir talvan, hvussu vi›brekin útja›arin er fyri upp og ni›urgangstí›in, tí beinanvegin afturgongd er í vinnulívinum, tekur fráflytingin dik á seg.

Eitt nú er fólkatali› í Su›uroynni minka› heili 874 fólk hesi seinastu 10 árini, ta› er ikki minni enn 15%.

Samstundis fall fólkatali› í Sandoynni 18% og hesi bæ›i økini hava mist so nógv ta› mesta mesta fólki› hesi árini, og fráflytingin hevur veri› nógv størri enn vinnuliga afturgongdin átti at fært vi› sær.

Í Havinin er t.d. fólkatali› vaksi› 1% samanlagt, og í Nor›oyggjum er ta› falli› „bara" 5% og ta› sama í Megineysturoy.

Eru ikki til

Á talvu tr‡ sæst ein útgreining av tølunum í talvu tvey, tí har sæst eitt yvirlit yvir, hvørjum einstøkum vinnum lønarútgjaldingarnar eru í.

Og á teirri talvuni sæst, at ta› er fiskiskapurin, sum er vinnan yvir øllum vinnum í Su›uroynni.

Tí í fjør vóru 103 milliónir útgoldnar í h‡rum til fiskimenn í Su›uroynni.

Men annars fingu su›uroyingar 36 milliónir í fiskavøruídna›inum, 24 milliónir í byggivinnuni, 17 milliónir í handli og umvælingum og 15 milliónir í ali og kryvjivinnuni.

Men allar a›rar vinnur eru næsan ikki til í Su›uroynni.

Eitt nú eru at kalla ongar vinnuligar tænastur í Su›uroynni.

Vinnuligar tænastur er teknistovur, grannsko›arar og bókhaldarar, teknistovur, rá›gevarar, lógfrø›ingar, verkfrø›ingar, og, ikki minst, edv og kunningartøknibara fyri at nevna nøkur dømi.

Annars manar talvan eisini tann pástandin í jør›ina, at Havnin er bara skrivstovur, tí talvan vísir at ta› er rættilgia nógv fiskivinna á Havnini, bæ›i fismimannah‡rur og fiskiídna›ur. Harumframt er ta› eisini eitt rættiliga umfatandi handilslív í Havnini.

Annars lata vit talvurnar tala fyri seg.

Ikki hvønn dag, ein vaskar einum sumbingi

Gle›in var stór, tá vágbingar í vár flota›u n‡ggjan kappró›rarbát og hátí›arhald var á Gar›abrúnni. Men lagnan var ikki blí› og í dag rógva Vágbingar í leiga›um 10 mannafari, tí n‡ggi vágbingur er tikin sundur aftur

Manningin á Vábingi hevur leiga› Sumbing at rógva í. Tá vit vitja›u, vaska›u teir bátin og sum ein tók til, so er ikki hvønn dag, at ein vaskar einum Sumbingi.

DAGFINN OLSEN

N‡ggi vágbingurin er sendur aftur til Havnar, ha›ani hann kom. Hann er tikin sundur og ta› sigst, at hann má nærum gerast av n‡ggjum.

Báturin gjørdist skeivur. Fimm mans máttu rógva í eina bor›inum, móti trimum í hinum. Bekkir brotna›u og sum heild hava royndirnar vi› n‡ggja Vágbingi veri› so ringar, at tær neyvan kundu veri› verri. Hetta gjørdi eisini sítt til, at hugur og vónir ikki vóru tær bestu, tá farast skuldi undir venjing av álvara og kappingin byrja›i.

Men Vágbingar góvust ikki á hondum. Teir leiga›u Sumbing til manningina á 10 mannafarinum at rógva í. Sumbingur er mála›ur í somu litum, sum Vágbingur, og hevur enntá fingi› navnabretti› hjá Vágbingi sett á.

Og manningin letur hampuliga væl at bátinum. Tá vit vitja›u í neystinum í farnu viku vóru vónirnar gó›ar. Manningin vóna›i at liggja frammaliga á jóansøku, tí teir tóktust samdir um, at um hetta ikki eydna›ist í heimasjógvi, so bleiv ta› neyvan a›rasta›ni.

Og manningin vaska›i og var um bátin, sum var hann teirra. Svampar, sápa, vatnslanga og anna› var í n‡tslu og sum ein av manningini skemtiliga tók til, me›an hann stríddist vi› einum svampi í hond, so er ta› ikki hvønn dag, at ein vaskar einum sumbingi.

Jóansøkan í Vági 2000

Fríggjadagin 23. juni

kl. 15.00–18.00 Landsbókasavnið og Vágs bókasavn hava framsýning í forkirkjuni við tilfari um og eftir Jákup Dahl, prósti: " Eg gekk mœr mót' havinum vestur"
kl. 17.00 Fótbóltur VBb - TBa smápiltar
kl. 17.45 Fótbóltur VBa - Royn smápiltar
kl. 19.00 Pisufundur við Minnisvarðan. Gunnvá Bjarkhamar fyri studentarnar og Turið D. Hentze, løgfrøðingur flyta fram røðu
kl. 19.00 Fótbóltur VB-TB old boys
kl. 19.30 Tivoli opnar á kaiøkinum. Gokart koyring oman fyri Polarfrost
kl. 20.00 Fótbóltur VB-TB 3. deild
kl. 20.00 Sion hevur útimøti við Føroya Banka
kl. 22.00 Frelsunarherurin og Meinigheitshúsið hava útimøti við Posthúsið
kl. 23.00 Dansur í VB-húsinum - Blanding spœlir

Leygardagin 24. juni

kl. 11.00 Fótbóltur VB - NSÍ 1. deild kvinnur
kl. 13.00 Fótbóltur VB - SÍ dreingir
kl. 13.45 Súkklukapping Grand Prix´00. Súkklað verður frá kirkjuni, niðan gjøgnum Krosslábrekku, úteftir til Vendiplássið, og vestur eftir aftur
kl. 13.45 Skrúðgonga frá Gamla skúla út til Minnisvarðan við luttøku av yrkis- og áhugabólkum
kl. 14.00 Jóansøkan verður sett av Mannbjørn Tausen, form. í VB. Ljómur luttekur saman við íslendska kórinum "Torrakórinn"
kl. 14.00 Tivoli opnar á kaiøkinum. Gokart koyring oman fyri Polarfrost
kl. 15.00 FM-kappróður. Aftaná róðurin verða steypini handað við Minnisvarðan av Óla Holm
kl. 16.00–19.00 Landsbókasavnið og Vágs bókasavn hava framsýning í forkirkjuni við tilfari um og eftir Jákup Dahl,prósti: "Eg gekk mœr mót' havinum vestur"
Skálin við Skálá skipar fyri tiltøkum á Suðurlaks hjá Hera Hjelm
kl. 16.00-22.00 Framsýningar av: tekstil-, trœ-, stein-, ull- og silvurlutum og øðrum handaligum arbeiði. Luttakarar: Karin Brattaberg, Ruth Magnussen, Torgerð Suðuroy, Katrin Olsen og Cederfelt Olsen
kl. 16.00-17.00 Rógvi Johansen er at hitta og skrivar autografar
kl. 17.00-17.30 Íslendska kórið "Torrakórinn" syngur
kl. 19.00-21.00 Rógvi Johansen er at hitta og skrivar autografar
kl. 18.00-21.30 "Tónleikakaffistova". Luttakarar: kl. 18.00-18.45 Ymiskir dansibólkar. Kl. 19.00-20.00 Íslendskir harmonikuleikarar. Kl. 21.30-22.00 Arnfinnur og Johanna - gittar og sangur
kl. 17.00-20.00 Skálin við Skálá hevur framsýning av Ruth Smith savninum í Gamla skúla
kl. 17.00-20.00 Fornminnisfelagið vísir part av savni í Gamla skúla
kl. 18.00 Møti í Sion
kl. 18.00 Fótbóltur VB - Sumba 1.deild, menn.
kl. 19.30 Konsert í Vágs høll, KULAR RØTUR spœla
kl. 20.00 Sion hevur útimøti við Føroya Banka
kl. 21.00 Bethel hevur útimøti
kl. 22.00 Frelsunarherurin og Missiónshúsið hava útimøti við Posthúsið
kl. 23.00 Dansur í Framtíðini, 15 íslendskir harmonikuspœlarar luttaka
kl. 23.00 Føroyskur dansur í Jómsborg
kl. 23.00 Dansur í VB-húsinum, HJARNAR spœla
kl. 23.00 Jóansøkuhugni - "Syngið við" við Posthúsið, sangheftir verða útfl. Hilda Peters, vágbingur, búsitandi í Onglandi- flytur fram røðu. Aftaná verður fyrverkarí
Kl. 24.00 Opið hús í Missiónshúsinum

Sunnudagur 25. juni

kl. 11.00 Gudstœnasta í Vágs kirkju.
kl. 11.00 SION hevur morgunmøti
kl. 14.00 Tivoli opnar á kaiøkinum. Gokart koyring oman fyri Polarfrost
kl. 14.30 Fótbóltur VB - ÍF smádreingir
kl. 15.00 Fólkafundur við Minnisvarðan. "Hesuferð" skipar fyri.
kl. 16.00 Kappróðrarfelagið skipar fyri Meksikanskari uppboðssøla á kaiøkinum
kl. 16.00-19.00 Landsbókasavnið og Vágs bókasavn hava framsýning í forkirkjuni við tilfari um og eftir Jákup Dahl, prósti : " Eg gekk mœr mót' havinum vestur"
kl. 16.00 Bingo í VB -húsinum
Skálin við Skálá skipar fyri tiltøkum á Suðurlaks hjá Hera Hjelm
kl. 16.00-22.00 Framsýningar av: tekstil-, trœ-, stein, ull- og silvurlutum og øðrum handaligum arbeiði. Luttakarar: Karin Brattaberg, Ruth Magnussen, Torgerð Suðuroy, Katrin Olsen og Cederfelt Olsen "Tónleikakaffistova"
kl. 18.00-21.30 Luttakarar: kl. 19.30-20.00 Ymiskir dansibólkar
Kl. 20.00-20.30 Musikkskúlanœmingar luttaka
Kl. 20.45-21.30 Henry og Hildur - gittar og sangur
kl. 16.00-20.00 Skálin við Skálá hevur framsýning av Ruth Smith savninum í Gamla skúla
kl. 16.00-20.00 Fornminnisfelagið vísir part av savni í Gamla skúla
kl. 18.00 Møti í Sion
kl. 18.00 Møti í Bethel
kl. 21.00 Bethel hevur útimøti
kl. 22.00 Frelsunarherurin og Meinigheitshúsið hava útimøti við Posthúsið
kl. 23.00 Dansur í VB-húsinum, Hans Jakki og vinmenn spœla

Allir fótbóltsdystir eru steypadystir